LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Strandfaraskip Landsins
og
Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Tórshavn, tann 11. november 2025
J.Nr.: LUM-16- 25/10570-31
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit

um framferðina hjá Strandfaraskipum Landsins og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum í sambandi við at nýggj ferðaseðlaskipan varð tikin í nýtslu í apríl 2025

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt mál av egnum ávum um nýggju ferðaseðlaskipanina hjá Strandfaraskipum Landsins. Serliga varð hugt at heimildini fyri, at lægstu prísir einans vóru tøkir til tey, ið meldaðu seg í skipanina og keyptu talgilt. Umboðsmaðurin setti fyrst spurningar til Strandfaraskip Landsins og síðani til Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið um málið.*

*Umboðsmaðurin metir, at myndugleikar ikki, uttan ítøkiliga lógarheimild, kunnu krevja, at borgarar melda seg í ávísa talgilda skipan. Tað var tí als ikki nøktandi, at Strandfaraskip Landsins setti slíka skipan í verk uttan at hava vissað sær, at neyðug heimild var til staðar. Samstundis var tað als ikki nøktandi, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, sum hevur yvirskipað eftirlit við Strandfaraskipum Landsins, ikki hevði sett seg inn í skipanina og tryggja sær, at hon var innan lógligu karmarnar. Tað er av stórum týdningi fyri tryggleika og rættin til líkaviðferð hjá borgarum, at slíkar talgildar skipanir, sum hava stóra ávirkan á bólkar av borgarum, ikki vera settar í verk uttan umhugsni og vissu fyri heimild.*

*Umboðsmaðurin gevur tí bæði Strandfaraskipum Landsins og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum eina álvarsliga átalu fyri framferðina í sambandi við at nýggj ferðaseðlaskipan varð tikin í brúk í apríl 2025. Samsvarandi § 10 í umboðsmanslógini verður send fráboðan um málið til Formansskap Løgtingsins, løgmann og landsstýrismannin í fiskivinnu- og samferðslumálum.*

## 2. Málslýsing

Tann 31. mars 2025 lýsti Strandfaraskip Landsins við broyting av prísbygnaði og dagføring av ferðaseðlaprísum. Lýst varð millum annað við:

> "Keyp av ferðaseðlum verður frameftir umvegis bíleggingarskipanina. Keypast kann tó eisini á staðnum áðrenn man fer umborð, men tá er tað uttan prísfyrimunir og til hægri prís."

Fyri at fáa greiðu á heimildini fyri slíkari skipan valdi umboðsmaðurin at seta spurningar til Strandfaraskip Landsins og síðani at taka upp mál av egnum ávum sambært umboðsmanslógini § 6, stk. 5.

Málið varð fyrst tikið upp yvir fyri Strandfaraskipum Landsins, og síðani vendi umboðsmaðurin sær eisini til Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, sum hevur yvirskipaða eftirlitið við Strandfaraskipum Landsins.

## 3. Málið

Við skrivi, dagfest 28. apríl 2025, varð soljóðandi skriv sent Strandfaraskipum Landsins:

> "... Herfyri lýsti Strandfaraskip Landsins við dagførdum prísum á oyggjaleiðum og nýggjari talgildari bíleggingarskipan.
>
> Sambært § 6, stk. 5 í løgtingslóg um Løgtingsins umboðsmann kann umboðsmaðurin sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.
>
> Umboðsmaðurin umhugsar at taka upp mál av egnum ávum viðvíkjandi dagførdu prísunum og nýggju bíleggingarskipanini.
>
> Sambært kunningartilfari á heimasíðuni verða allir kundar mæltir til at stovna sær ein brúkara í bíleggingarskipanini fyri at fáa besta prísin og bestu ferðasømdir.
>
> Á oyggjaleiðunum verða nú trý sløg av ferðaseðlum, alt eftir um tú keypir ferðaseðilin umborð ella umvegis talgildu bíleggingarskipanina, og hvar tú ert búsitandi.
>
> Soleiðis sum umboðsmaðurin skilir kunningartilfarið, eru lægstu ferðaseðlakostnaðirnir einans tøkir við keypi á netinum.
>
> Í hesum sambandi spyr umboðsmaðurin, hvussu borgarar, sum ikki nýta talgilt samskifti, eru stillaðir í mun til keyp av ferðaseðlum, herundir um teir á annan hátt hava møguleika at keypa ferðaseðlar til lægstu ferðaseðlaprísir?
>
> Biðið verður um, at frágreiðingin er umboðsmanninum í hendi innan 3 vikur."

Tann 21. mai 2025 minti umboðsmaðurin á málið.

Tann 23. mai 2025 sendi Strandfaraskip Landsins umboðsmanninum soljóðandi svar:

> "... Strandferðslan leggur stóran dent á at hava eitt gott samskifti við teir stovnar, sum umboða brúkarabólkar, ið ein slík skipan sum bíleggingarskipanin kann verða avbjóðing

fyri. Endamálið er at tryggja, at SSL áhaldandi kann menna tænasturnar, so tær verða atkomuligar hjá øllum borgarum.

Samskifti er við bæði Pensionistafelagið og Megd fyri at tryggja, at limir teirra eisini hava møguleika at brúka tænasturnar, ið SSL hevur í bíleggingarskipanini. Arbeitt verður við ymiskum ítøkiligum átøkum fyri at røkka hesum málum.

Eitt av hesum er eitt fysiskt kort - SSL-kortið - ið er ætlað teimum, sum ikki hava møguleika at brúka eina snildfon. Kortið er eisini ætlað børnum, um tað gerst neyðugt ella í heila tikið fólki, sum av onkrari orsøk ikki kunnu brúka talgildu loysnina hjá SSL.

Kortið er ikki heilt klárt enn, men hetta arbeiðið hevur – saman við arbeiðinum at seta sonevnda vinnukundamodulið í verk – hægstu raðfesting hjá SSL at fáa inn í booking.ssl.fo skipanini.

Við SSL-kortinum verður møguligt at fáa lægsta prís, tvs sum 'búsitandi' ella árskort, um man keypir tað, tí kortið verður knýtt í teirra brúkara á booking.ssl.fo. Tvs at SSL kann hjálpa brúkarunum við at:

Gera ein brúkara
Knýta SSL-kortið í brúkaran
Knýta teirra gjaldskort í brúkaran, sum man so kann brúka við SSL-kortinum
Seta pengar inn á booking.ssl.fo brúkaran, sum man kann brúka við SSL-kortinum.
SSL-kortið tryggjar í útgangsstøðinum ikki pláss umborð, men so hvørt ið skipanin verður ment, verður kannað, um hetta kann fáast at bera til. Tað er heldur ikki ofta, at tað er plásstrot umborð á ferjunum hjá SSL. Um brúkarin frammanundan er í iva, ber sjálvandi altíð til at seta seg í samband við SSL fyri at fáa hjálp og vegleiðing."

Tann 27. mai 2025 spurdi umboðsmaðurin Strandfaraskip Landsins í telduposti, um tað bar til at siga, hvussu prísásetingin var í táverandi løtu. Um munur varð gjørdur á prísinum eftir, um bílagt varð talgilt ella keypt á staðnum.

Tann 16. juni 2025 varð áminning send.

Tann 23. juni 2025 sendi umboðsmaðurin enn eina áminning til Strandfaraskip Landsins og vísti á, at um umboðsmaðurin ikki frætti innan 14 dagar, fór umboðsmaðurin venda sær til landsstýrismannin í fiskivinnu- og samferðslumálum.

Tann 26. juni 2025 umbar Strandfaraskip Landsins seina svarið og sendi soljóðandi frágreiðing:

"Bíleggingarskipanin er í høvuðsheitum talgild, og so at siga alt ferðaseðlakeyp til ferðing við ferjunum hjá SSL fer tí frameftir at fara fram talgilt.

Nýggi prísbygnaðurin er trimum bólkum:

1 Búsitandi
2 Ikki-búsitandi
3 Keyp á staðnum

> 1'arin er føroyingar, ið umvegis váttan av p-talinum (yvirfyri SSL í bíleggingarskipanini) kunnu keypa sær bíligasta ferðaseðilin - á netinum. Fyri tey allarflestu ferðandi er talan um keyp á netinum; men fyri nøkur fer at verða talan um at útvega sær eitt SSL-kort, sum verður knýtt saman við tí persónliga gjaldskortinum. Hesir brúkarar kunnu so við SSL-kortinum í hond fara umborð á allar SSL-ferjur og fáa tann bíligasta búsitandi-prísin. Her kann vera talan um brúkarar, ið ikki kunnu, megna ella av øðrum orsøkum ikki brúka (netgrundaðu) bíleggingarskipanina. SSL væntar ikki, at talan verður um stóran hóp av brúkarum, men t.d eldri og børn kunnu blíva viðkomandi her. SSL-kortið var ikki klárt, tá ið skipanin byrjaði 8. apríl, men SSL hevur síðani byrjan og inntil nú roynt at skipa so fyri, at t.d eldri brúkarar ikki skulu rinda tann hægsa prísin (keyp-á-staðnum). SSL-Kortið er nær við at vera liðugt nú, og verður tikið í brúk í næstum – vit hava ikki enn neyva dagin.
>
> 2'arin fevnir um tey, sum ikki við einum føroyskum p-tali kunnu prógva, at tey eru búsitandi í Føroyum, og harvið koma rinda ein hægri ferðaseðlaprís. Tað er á hendan hátt, at tað er gjørligt hjá SSL at skyna ímillum, hvør ið er búsitandi í Føroyum og ikki, og tí er eisini bíleggingarskipanin – har ið alt verður avgreitt á netinum – ein fullkomuliga avgjørd fyritreyt fyri, at man yvirhøvir kann skyna ímillum búsitandi og ikki-búsitandi. Í mong ár varð t.d tosað um at gera eitt fysiskt kort til allar føroyingar og líknandi leistir – men tað var ógjørligt at koma á mál við hesum evninum upp á tann mátan; og talgilda netgrundaða bíleggingarskipanin – við p-talinum og knýtinum til Landsfólkayvirlitið – er loysnin upp á eina áratíggju langa umrøðu og viðgerð.
>
> 3'arin fevnir um teir brúkarar, ið ikki hava bílagt sær ferðaseðil á netinum – tvs umvegis, teldu, teldil ella telefonina, sum nokk er tað mest vanliga eftirhondini - men 'koma á staðið'. Tá kann t.d vera talan um onkran í einum bili – sum so umvegis fartelefon 'keypir á staðnum' og tá rindar tann hægsta ferðaseðlaprísin. Sí prísdømi frá suðuroyarleiðini (smyril) fyri ferðafólk niðanfyri: Prísir - Oyggjaleiðir- Strandferðslan. Talan er í onkrum heilt fáum og einstøkum førum eisini um brúkarar, ið – út frá einum 'mótmælis-sjónarmiði' ikki vilja rinda á netinum – og tí vilja gjalda við reiðum peningi. Tá er neyðugt at biðja tey fara umborð í kioskina at keypa sær ein ferðaseði. Og tá rinda tey so keyp-á-staðnum prísin."

Eftir hetta svarið boðaði umboðsmaðurin, tann 1. juli 2025, Strandfaraskipum Landsins frá, at umboðsmaðurin hevði gjørt av at taka mál upp av egnum ávum viðvíkjandi nýggju ferðaseðlaskipanini hjá Strandfaraskipum Landsins, serliga fyri at kanna heimildina fyri at lægstu prísir einans vóru tøkir til tey, ið melda seg í skipanina og keypa talgilt. Umboðsmaðurin vísti í hesum sambandi á, at umboðsmaðurin áður í tveimum málum um talgilt samskifti hevur mett, at myndugleikar ikki, uttan ítøkiliga lógarheimild, kunnu krevja, at borgarar melda seg í ávísa talgilda skipan (LUM 14/00048 og LUM 201300055). Umboðsmaðurin setti tí Strandfaraskip Landsins soljóðandi spurningar:

> " ...Umboðsmaðurin vil tí við hesum spyrja Strandfaraskip Landsins:
> - hvør er heimildin fyri kravið um tilmelding í skipanina og kravið um talgilt samskifti fyri at fáa besta prís?
>
> Svar tykkara ynskist innan 15. august."

Tá ið umboðsmaðurin ikki hevði fingið svar frá Strandfaraskipum Landsins varð áminning send tann 19. august 2025.

Tann 22. august 2025 umbar Strandfaraskip Landsins vantandi svarið vegna summarfrítíð og høgt arbeiðstrýst í sambandi við 20 ára klassing/dokking av Smyrli. Svarið varð lovað til komandi vikuna.

Tann 28. august 2025 sendi Strandfaraskip Landsins umboðsmanninum soljóðandi svar til spurningarnar:

> "...Strandferðslan kann ikki vísa til eina beinleiðis heimild fyri kravinum um tilmelding í bíleggingarskipanina fyri at fáa besta prísin.
>
> Men soleiðis, sum dagsins samfelag er skrúvað saman við at kalla talgilding yvir allar linjuna, metir SSL seg ikki at bróta nakrar áseting ella at gera seg inn á brúkaran við at gera tað til ein prísfyrimun, um keypt verður á netinum.
>
> SSL hevur t.d verið ein av størstu fíggjarligu – einstøku almennu - stuðlunum ísv menningin av Samleikanum hjá Talgildum Føroyum – ið Landið eigur og mennir. Við tí fyri eyga at kunna brúka Samleikan til talgildu bíleggingarskipanina.
>
> SSL ásannar tó, at tað kann vera hugstoytt ella óheppið, um tað eru brúkarar, ið av onkrum serligum ávum ikki kunnu útvega sær ferðaseðilin á netinum, tvs talgilt.
>
> Í okkara fyrsta svari av 23. mai 2025 verður eitt fysiskt kort nevnt, sum ikki-talgildir brúkarar kunnu brúka, um tey útvega sær hetta gjøgnum SSL, og verður hetta kortið testað í løtuni og er skjótt klárt at taka í nýtslu.
>
> Vónandi svara vit nøktandi upp á tykkara fyrispurning."

Tann 29. august 2025 kunnaði umboðsmaðurin Strandfaraskip Landsins um, at umboðsmaðurin fór at seta avvarðandi landsstýrismanni fyrispurning um evnið fyri at kunna seg nærri og kunna taka støðu til málið.

## 4. Frágreiðingar frá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum

Tann 1. september 2025 sendi umboðsmaðurin Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum skriv viðvíkjandi nýggju ferðaseðlaskipanini hjá Strandfaraskipum Landsins. Umboðsmaðurin sendi avrit av samskiftinum við Strandfaraskip Landsins og vísti á, at Strandfaraskip Landsins ikki kundi vísa til eina beinleiðis heimild fyri kravinum um tilmelding í bíleggingarskipanina fyri at fáa besta prísin. Umboðsmaðurin vísti á sítt sjónarmið, um at myndugleikar ikki, uttan ítøkiliga lógarheimild, kunnu krevja, at borgarar melda seg í ávísa talgilda skipan, og setti soljóðandi fyrispurning:

> "Umboðsmaðurin fer tí at biðja landsstýrismannin í samferðslumálum, sum hevur yvirskipaða eftirlitið við Strandfaraskipum Landsins, um møguligar viðmerkingar til nevndu spurningar, herundir heimildini fyri at kravið um at melda seg í skipanina, hvussu

> rættindi til bestu prísir og bestu ferðasømdir eru fyri ikki-talgildar borgarar í løtuni, eins og hvussu tey ætlandi verða, tá ið SSL-kortið verður tikið í nýtslu.“

Eftir longda svarfreist sendi Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið umboðsmanninum soljóðandi svar tann 30. september 2025:

> “...Løgtingsins umboðsmaður hevur biðið Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið (Ráðið) um viðmerkingar til svarið frá Strandfaraskipi Landsins (Strandferðslan).
>
> Tað er Strandferðslan, sum hevur staðið fyri arbeiðinum at gera bíleggingarskipanina, meðan Ráðið hevur yvirskipaða eftirlitið við Strandferðsluni.
>
> Løgtingsins umboðsmaður hevur spurt Ráðið um heimildina fyri, at Strandferðslan kann krevja, at ferðandi skulu vera knýtt at einari talgildari skipan fyri at kunna keypa ferðaseðil til lægsta prísin. Somuleiðis er Ráðið spurt um, hvussu rættindi til bestu prísir og bestu ferðasømdir eru fyri ikki-talgildar borgarar í løtuni, og hvussu tey rættindini ætlandi verða, tá ið SSL-kortið verður tikið í nýtslu.
>
> Vit liva í einari tíð, har fleiri og fleiri tænastur gerast talgildar, bæði fyri at fylgja rákinum og fyri at effektivisera arbeiðið. Hjá Strandferðsluni hevur tað verið ein stór avbjóðing at skipa raksturin á nøktandi hátt á øllum leiðum. Við nýggju bíleggingarskipanini er arbeiðið hjá Strandferðsluni blivið munandi betri skipað, og bíleggingarskipanin hevur gjørt tað lættari hjá ferðafólki at ferðast við oyggjaleiðum. Harumframt hevur bíleggingarskipanin eisini gjørt tað munandi lættari hjá starvsfólkunum umborð á strandfaraskipunum at leggja arbeiðið til rættis, tí tey nú vita frammanundan, hvussu nógv akfør, ferðafólk og farmur er við á hvørjum túri.
>
> Ráðið viðurkennir, at lógargrundarlagið fyri at seta sum treyt, at ferðandi skulu vera knýtt í talgildu bíleggingarskipanina hjá Strandferðsluni og hava knýtt sítt gjaldskort í skipanina fyri at fáa lægsta prísin, hevur ikki verið í lagi. Hetta harmast Ráðið um.
>
> Tá Ráðið bleiv varugt við, at heimild manglaði, heitti Ráðið á Strandferðsluna um at broyta mannagongdirnar í sambandi við keyp av ferðaseðlum, soleiðis at munur ikki verður gjørdur á teimum ferðandi, og á tí prísinum tey fáa, óansæð um tey keypa ferðaseðilin frammanundan umvegis talgildu bíleggingarskipanina hjá Strandferðsluni ella á staðnum, áðrenn farið verður umborð á skipið.
>
> Tann 17. september 2025 boðaði Strandferðslan alment frá, at ferðandi framyvir eisini kunnu keypa ferðaseðil á staðnum áðrenn fráferð til lægsta prísin, og at rindast kann annaðhvørt við reiðum peningi ella við gjaldskorti. Tó verður sett sum treyt, at tann ferðandi skal kunna prógva sín bústað í Føroyum við annaðhvørt at vísa eina bústaðarváttan, sum fæst frá kommununi, har viðkomandi hevur bústað, ella við at vísa sítt samleikaprógv í talgildu appini “Skjáttan”.
>
> Sostatt hava bæði ferðafólk og ferðafólk við akfari, sum lúka bústaðartreytina, nú møguleika fyri at keypa ferðaseðil og rinda við annaðhvørt reiðum peningi ella gjaldskorti á staðnum og samstundis fáa tann lægsta prísin.
>
> Í næstum fer Strandferðslan at koma við einum nýggjum fysiskum SSL-korti til ferðandi, sum av einhvørjari orsøk ikki hava møguleika fyri at brúka talgildu bíleggingarskipanina. Hetta er ein valfrí eykatænasta, sum Strandferðslan fer at bjóða. SSL-kortið er ment til teirra, sum ynskja eina smidligari og meira sjálvvirkandi loysn, har ferðing og gjald verða

avgreidd uttan, at tað er neyðugt at keypa ferðaseðil til hvørja einstaka ferð. Kravið um talgilda skráseting er sostatt einans knýtt at hesi valfríu tænastu og er ikki, og verður heldur ikki, ein treyt fyri at fáa atgongd til lægsta prísin. Sostatt er talan bert um ein annan gjaldshátt, har tann ferðandi við at skráseta sítt p-tal talgilt og knýtir eitt gjaldskort til brúkaran, kann tryggja sær lægsta prísin. Hóast henda nýggja tænastan kemur, hava øll ferðandi, sum lúka treytirnar um bústað, javnbjóðis atgongd til tænasturnar og lægstu prísirnar hjá Strandferðsluni.

Við hesum er tryggjað, at øll ferðandi, sum lúka bústaðartreytina, bæði ferðafólk og ferðafólk við akfari, hava javnbjóðis atgongd til lægsta prísin uttan mun til, um tey brúka talgildar skipanir ella ikki.

Ráðið fer nú at endurskoða bíleggingarskipanina fyri at tryggja, at tey ferðandi hava somu atgongd til tær tænastur og prísir, sum Strandferðslan veitir."

Við telduposti, tann 30. september 2025, setti umboðsmaðurin ráðnum hesar uppfylgjandi spurningar:

"Í frágreiðingini stendur, at Strandferðslan hevur staðið fyri arbeiðinum at gera bíleggingarskipanina, meðan Ráðið hevur yvirskipaða eftirlitið við Strandferðsluni.

Umboðsmaðurin spyr í hesum sambandi, um tað er rætt skilt, at ráðið ikki hevur viðgjørt spurningin um heimildina fyri skipanini, fyrrenn í sambandi við fyrispurning umboðsmansins.

Í frágreiðingini stendur eisini, at ráðið hevur heitt á Strandferðsluna um at broyta mannagongdirnar í sambandi við keyp av ferðaseðlum.

Eg fari biðja um at fáa avrit av hesum samskifti og møguligum skjølum í sambandi við viðgerð av heimildini fyri skipanini. "

Tann 13. oktober 2025 sendi ráðið umboðsmanninum soljóðandi svar:

"... Tað er rætt skilt, at spurningurin um heimildina ikki varð umrøddur ella viðgjørdur fyrrenn eftir, at fyrispurningurin frá Umboðsmanninum varð móttikin.

Sum Ráðið skilti spurningin frá Løgtingsins umboðsmanni, so átti ein heimild at verið til staðar. Hesum er Ráðið eisini samt í. Strandferðslan hevur síðani broytt mannagongdirnar, so skipanin ikki longur krevur serliga heimild.

Viðvíkjandi umbønini frá Umboðsmanninum um avrit av samskifti og skjølum í hesum sambandi, verður viðlagdur teldupostur frá 16. september 2025 frá Ráðnum til Strandferðsluna um málið frá Løgtingsins Umboðsmanni. Eisini er viðlagt notat frá Teams-fundi, sum Ráðið og Strandferðslan høvdu tann 16. september, har samskift varð um heimildarspurningin, og har Strandferðslan var biðin um at finna eina loysn, soleiðis at tað framyvir skal bera til hjá ferðafólki at keypa ferðaseðil til lægsta prísin uttan at vera knýtt at eini talgildari skipan. Somuleiðis er teldupostur frá Strandferðsluni til Ráðið dagfestur 17. september 2025 um nýggju mannagongdina hjá Strandferðsluni viðlagdur, umframt eitt telefon notat frá samrøðu millum Ráðið og umboð fyri Strandferðsluna frá sama degi um nýggju mannagongdirnar.
Harumframt kunnu vit lýsa málsgongdina soleiðis:

Byrjanin við bíleggingarskipanini
Februar 2023: Fyrireikingararbeiðið við bíleggingarskipanini hjá Standferðsluni byrjar. Tørvur hevur leingi verið á at effektivisera arbeiðið hjá Strandferðsluni, gera tað lættari hjá ferðandi at bíleggja ferðaseðil við einari talgildari loysn, og at gera tað lættari hjá starvsfólkunum at leggja arbeiðið til rættis. Politiskt ynski er um at javnseta fólk í ymsu pørtunum í landinum, samstundis sum prísir fyri útlendsk ferðafólk eisini skulu endurskoðast.

Gongdin
2023-2025: Stovnsfundir við Strandferðsluna, har Ráðið er blivið kunnað um gongdina í arbeiðinum. Leikluturin hjá Strandferðsluni hevur verið at staðið fyri sjálvari menningini av bíleggingarskipanini.
Apríl 2025: Broytti prísbygnaðurin hjá Strandferðsluni verður settur í gildi."

Sambært frágreiðingunum frá ráðnum, dagfestar 30. september og 13. oktober 2025, hevði ráðið nú heitt á Strandfaraskip Landsins um at broyta mannagongdirnar í sambandi við keyp av ferðaseðlum. Tann 17. september 2025 boðaði Strandfaraskip Landsins alment frá, at ferðandi framyvir eisini kunnu keypa ferðaseðil á staðnum áðrenn fráferð til lægsta prísin, og at rindast kundi annaðhvørt við reiðum peningi ella við gjaldskorti.

Við støði í frágreiðingunum metti umboðsmaðurin, at tað kundi hugsast at vera borgarar, sum hava rindað ov høgan prís fyri ferðaseðlar uttan neyðuga heimild. Av tí at ráðið ikki hevði nevnt henda spurning í frágreiðingum sínum, spurdi umboðsmaðurin í skrivi, tann 16. oktober 2025, hvussu ráðið ætlaði at fyrihalda seg til borgarar, sum kunnu hava rindað ov høgan prís í tíðarskeiðnum, skipanin hevur verið galdandi.

Tann 30. oktober 2025 sendi Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið umboðsmanninum soljóðandi svar:

"... Ráðið er tilvitað um, at teir borgarar, sum í hesum tíðarskeiði hava goldið hægri prís fyri ferðaseðil, enn heimilað var, eiga at fáa munin endurgoldnan.

Ráðið hevur tí biðið Strandferðsluna um at kanna, hvussu hetta kann gerast í praksis, somuleiðis sum Strandferðslan eisini er biðin um at kanna, hvussu nógv ferðandi hetta fevnir um, hvussu stóra upphædd talan er um, og um tað er møguligt at eyðmerkja tey ferðandi, sum hava goldið ov nógv.

Tá hesar upplýsingar fyriliggja, skal Strandferðslan taka støðu til, hvussu endurgjald kann rindast til tey, sum hava goldið ov nógv. Tá hetta er komið í rætt lag, fer Ráðið at kunna Løgtingsins Umboðsmann."

Av skjølunum sæst, at ráðið, tann 23. oktober 2025, hevði sent soljóðandi teldupost til Strandfaraskip Landsins viðvíkjandi endurgjaldsspurninginum:

"Vísandi til málið hjá Løgtingsins Umboðsmanni um bíleggingarskipanina, hevur Ráðið tørv á at fáa upplýst frá Strandferðsluni talið av ferðandi, sum kunnu hava goldið hægri prís í tíðarskeiðnum, sum skipanin hevur verið galdandi, og hvussu stóra upphædd er talan um.

> Ráðið ynskir eisini at fáa upplýst, um tað er møguligt hjá Strandferðsluni at eyðmerkja tey ferðandi, sum hava goldið ov høgan prís, t.d. um keypini kunnu knýtast til navn, bústað ella gjaldskort.
>
> Hetta skal einans nýtast til at meta um, hvussu tað er møguligt at rinda endurgjald í praksis."

Ráðið hevði, tann 3. november 2025, ikki fingið svar frá Strandfaraskipum Landsins.

Tann 31. oktober 2025 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at málið var mett nóg væl upplýst og farið varð nú undir endaligu viðgerðina av málinum.

## 5. Lógargrundarlagið og regluverkið

Lógarheimildin undir Strandfaraskipum Landsins er Løgtingslóg nr. 82 frá 15. mai 2001 um fólka- og farmaflutning, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 7. mai 2019.

Í grein 2 er henda áseting um flutningsskyldu landsins:

> "§ 2. Landið hevur skyldu til at skipa fyri:
> 1) nøktandi sjóvegis fólkaflutningi, farmaflutningi og/ella flutningi av akførum, og
> 2) nøktandi landvegis fólkaflutningi, á teimum farleiðum, har tað hevur stóran samfelagsligan týdning, at skipað verður fyri slíkum flutningi.
> Stk. 2. 1) 2) 3) 4) Flutningsskyldan fevnir um sjóvegis farleiðirnar rnillum: Tvøroyri - Tórshavn, Skúvoy - Sand, Skopun - Gamlarætt, Skopun -Hest, Hest - Gamlarætt, Nólsoy - Tórshavn, Sørvág - Mykines, Klaksvík - Kalsoy, Hvannasund - Fugloy, Hvannasund - Svínoy, umframt tær sjóvegis og landvegis farleiðir, ið landsstýrismaðurin í kunngerð ásetir flutningsskyldu fyri.
> Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann seta reglur um, at farmur skal lúka ávís krøv til stødd, vekt, innhald og innpakking."

Lógin heimilar landsstýrismanninum at geva øðrum loyvi at skipa fyri flutningi undir ávísum treytum. Kravið um loyvi er tó ikki galdandi, um landið sjálvt skipar fyri flutninginum.

Nærri áseting um raksturin av farleiðum er ásettur í § 4:

> § 4. 5) Raksturin av flutningi, ið kemur undir § 2, kann bara verða skipaður antin soleiðis, at landið sjálvt rekur flutningin, ella at landsstýrismaðurin bjóðar raksturin út fyri í mesta lagi 7 ár í senn. Landsstýrismaðurin hevur heimild til at avtala gjald fyri rakstur, ið verður boðin út.

Strandfaraskip Landsins er landsfyritøka undir Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi.

Sambært § 37 í málsøkjabýtinum hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum yvirskipaða eftirlitið við Strandfaraskipum Landsins og heimild at geva teimum tænastuboð.

Virksemið hjá Strandfaraskipum Landsins er skipað eftir løgtingslógini um fólka- og farmaflutning, eins og eftir reglugerð fyri Strandfaraskip Landsins, dagfest 30. juli 2025:

> "Reglugerð
> I. Bygnaður
> § 1. Strandfaraskip Landsins er landsfyritøka undir Føroya landsstýri.
> Stk. 2. Landsstýrið ásetur tær reglur, sum til eina og hvørja tíð skulu galda fyri virksemið í fyritøkuni.
>
> Il. Uppgávur
> § 2. Fyritøkan hevur til uppgávu at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi.
> § 3. Fyritøkan skal í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði.
>
> III. Leiðsla
> § 4. Landsstýrið setur stjóran, ið hevur dagligu fíggjarligu- og fyrisitingarligu ábyrgdina av allari fyritøkuni og eisini ábyrgd av øllum virksemi i fyritøkuni mótvegis landsstýrinum.
> Stk. 2. Stjórin setur og loysir úr starvi øll starvsfólk i fyritøkuni sambært galdandi reglum.
> Stk. 3. Stjórin hevur ábyrgdina av, at virksemið i fyritøkuni verður stjórnað samsvarandi hesum reglum og annars í samsvari við reglurnar í fyritøkuni og lóggávuni annars.
> Stk. 4. Fyritøkan verður bundin við undirskrift stjórans. Stjórin kann geva ávísum starvsfólkum prokura.
>
> IV. Roknskaparverk
> § 5. Landsfyritøkan er frá 1. januar 2014 vorðin partur av Búskaparskipan Landsins. Roknskapurin verður grannskoðaður av Landsgrannskoðanini ella av løggildum grannskoðara sambært ásetingum fyri almennar roknskapir. Áðrenn roknskapurin verður endaliga góðkendur, verður hann lagdur fyri landsstýrismannin til viðmerkingar.
>
> V. Gildiskoma
> § 6. Henda reglugerð kemur í gildi 1. august 2015.
> Stk. 2. Samstundis fer úr gildi landsstýrisins reglugerð um Strandfaraskip Landsins frá 1. januar 1997.
>
> Tórshavn, tann 30. juli 2015..."

Tað síggjast ikki beinleiðis ásetingar um góðkenning av ferðaseðlaprísum ella mannagongdir fyri broytingar av ferðaseðlaprísum í lógini um fólka- og farmaflutning ella reglugerðini fyri Strandfaraskip Landsins.

## 6. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um nýggju ferðaseðlaskipanina hjá Strandfaraskipum Landsins, serliga heimildina fyri at lægstu prísir einans vóru tøkir til tey, ið meldaðu seg í skipanina og keyptu talgilt, framferðarháttin hjá Strandfaraskipum Landsins í hesum sambandi og leiklutin hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum.

**Heimildin fyri at áleggja luttøku í talgildari skipan og mismunur á borgarum**
Tað er mín fatan, at myndugleikar ikki, uttan ítøkiliga lógarheimild, kunnu krevja, at borgarar melda seg í ávísa talgilda skipan.

Tá Strandfaraskip Landsins, tann 31. mars 2025, lýsti við nýggjum ferðaseðlaprísum og broyttum prísbygnaði, varð beinleiðis upplýst, at keyp av ferðaseðlum frameftir fór at vera umvegis talgildu bíleggingarskipanina. Keyp á staðnum fór framvegis at vera gjørligt, áðrenn farið var umborð, men tað fór at vera uttan prísfyrimunir og til hægri prísir.

Sambært almennari kunning komu broytingarnar í bíleggingarskipanini í gildi týsdagin 8. apríl 2025.

Eg metti skipanina vera ivasama, bæði viðvíkjandi heimild til at krevja talgilda luttøku og viðvíkjandi tí muni, sum skuldi gerast á ferðaseðlaprísi, um borgarar ikki nýttu talgildu loysnina.

Hóast møguligt skuldi vera at keypa uttan um talgildu skipanina, vildi tað ført við sær munandi hægri prísir fyri hesar borgarar. Slík skipan, haldi eg, krevur greiða heimild.

Strandfaraskip Landsins varð spurt og hevur ikki kunnað víst á heimild fyri at seta krav um tilmelding í bíleggingarskipanina fyri at fáa lægsta prísin.

Málið um nýggju ferðaseðlaskipanina og spurningurin um heimild fyri kravinum um luttøku í talgildu skipanini fyri at fáa lágan kostnað var tí eisini reist yvir fyri Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, sum hevur yvirskipaða eftirlitið við Strandfaraskipum Landsins.

Eg hevði frammanundan ta fatan, at ráðið átti at verið kunnugt við nýggju skipanina og tað víðfevnda kravið um talgilt samskifti. Hetta bæði tí at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið varar av Strandfaraskipum Landsins, og tí at almennar lýsingar høvdu verið frammi um skipanina.

Ráðið hevur tó eftir fyrispurningin frá umboðsmanninum viðurkent, at lógargrundarlagið fyri at seta sum treyt, at ferðandi skulu vera knýtt í talgildu bíleggingarskipanina og hava knýtt sítt gjaldskort í skipanina fyri at fáa lægsta prísin, hevur ikki verið í lagi. Hetta harmast ráðið um.

Tá ráðið varð varugt við, at heimildin vantaði, heitti ráðið á Strandfaraskip Landsins um at broyta mannagongdirnar í sambandi við keyp av ferðaseðlum, soleiðis at munur ikki verður gjørdur á teimum ferðandi, og á tí prísinum tey fáa, óansæð um tey keypa ferðaseðilin frammanundan, umvegis talgildu bíleggingarskipanina, ella á staðnum, áðrenn farið verður umborð á skipið.

Í hesum sambandi varð almenn fráboðan, tann 17. september 2025, send frá Strandfaraskipum Landsins, og sostatt hava ferðafólk, sum lúka bústaðartreytina, nú møguleika fyri at keypa ferðaseðil og rinda við annaðhvørt reiðum peningi ella gjaldskorti á staðnum og samstundis fáa tann lægsta prísin.

Eg skilji tí støðuna á tann hátt, at ráðið ikki hevur viðgjørt spurningin um heimild fyri nýggju ferðaseðlaskipanini, fyrr enn umboðsmaðurin setti teimum spurning, tann 1. september 2025.

Samanumtikið taki eg til eftirtektar, at óheimilaði munurin, sum varð gjørdur á borgarum við kravinum um luttøku í talgildu skipanini, nú er steðgaður.

Eg haldi tað tó als ikki vera nøktandi, at Strandfaraskip Landsins setti slíka skipan í verk uttan at hava vissað sær, at neyðug heimild var til staðar.

Samstundis er tað als ikki nøktandi, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, sum hevur yvirskipað eftirlit við Strandfaraskipum Landsins, ikki hevði sett seg inn í skipanina og tryggjað sær, at nýggja skipanin var innan lógligu karmarnar. Talan var um eina inntrívandi skipan, sum fór at raka borgarar, sum ikki høvdu møguleika ella ynski at samskifta talgilt. Prísurin fyri at rinda á staðnum sá út til at vera tvífalt so høgur sum við talgildari bílegging. Hetta er eftir míni meting alt annað enn nøktandi framferð.

Um ætlanin er at gera mun á prísum eftir luttøku í talgildum skipanum, so er avgerandi, at nágreiniliga verður hugsað um ymsu bólkarnir í okkara samfelag. Almennar skipanir eiga ikki at fremja mismun yvir fyri borgarum, sum antin ikki megna ella ikki ynskja at samskifta talgilt, uttan so at greið heimild er fyri at krevja talgilda luttøku.

**Lógargrundarlag – ábyrgd fyri lógligari fyrisiting**

Orsøkin til at eg av egnum ávum valdi at kanna nýggju ferðaseðlaskipanina nærri, var tann almenna kunningin, sum varð løgd fram, og tey ivamál, sum eg beinanvegin helt meg síggja.

Ein skipan tóktist verða sett í verk, sum gjørdi stóran fíggjarligan mun á borgarum, alt eftir í hvønn mun teir eru førir fyri ella ynskja at nýta talgildar tænastur.

Eg gevi mær far um, at tað er Strandfaraskip Landsins, sum hevur staðið fyri arbeiðinum at gera bíleggingarskipanina, og at skipanin hevur verið fleiri ár ávegis.

Sambært reglugerðini fyri Strandfaraskip Landsins hevur Strandfaraskip Landsins til uppgávu at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Hetta er bundin uppgáva, sum skal røkjast.

Harumframt er ásett, at Strandfaraskip Landsins í so stóran mun sum gjørligt skal rekast á handilsligum støði. Hetta inniber eftir míni meting, at handilssligu atlitini ikki kunnu koma fram um áløgdu flutningsskylduna og til dømis almennu meginregluna um líkaviðferð av borgarum og kravið um heimild fyri at krevja talgilda luttøku.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum hevur sambært málsøkjabýtinum yvirskipaða eftirlitið við Strandfaraskipum Landsins og heimild at geva tænastuboð. Í hesum má metast at liggja bæði heimild og skylda hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum at tryggja sær, at flutningsskyldan verður røkt á lógligum grundarlagi.

Eg haldi, at hetta í sambandi við flutningsskyldu landsins innibar eina skyldu hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum at vissa sær, at nýggja ferðaseðlaskipanin hjá Strandfaraskipum Landsins hevði neyðuga heimild og leyk grundleggjandi fyrisitingarligar meginreglur. Um ikki áðrenn so í øllum førum, tá skipanin bleiv greitt lýst alment við treytum, sum gjørdu mun á borgarum og kravdu talgilda luttøku fyri lagaligastu prísir og treytir.

Eg eri greið yvir, at skipanin hevur verið leingi ávegis, og at hvørki lógin um fólka- og farmaflutning ella reglugerðin fyri Strandfaraskip Landsins ásetur beinleiðis, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið skal góðkenna nýggjar prísir og ferðaseðlaskipan. Hóast hetta, haldi eg, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevur skyldu at hava eitt vakið eyga og at røkja sína grundleggjandi eftirlitsskyldu. Eftirlit átti tí at verið við, at neyðug heimild var fyri nýggju skipanini, og at hon ikki var í stríð við meginregluna um líkaviðferð av borgarum, í seinasta lagi tá skipanin varð sett í gildi.

Framferðin hjá ráðnum í sambandi við nýggju ferðaseðlaskipanina er tí eftir míni meting átaluverd.

**Endurrindan av ov høgum ferðaseðlakostnaði**

Ráðið boðaði mær, tann 30. september 2025, frá, at ráðið hevði heitt á Strandfaraskip Landsins um at broyta mannagongdir í sambandi við keyp av ferðaseðlum, so at munur ikki verður gjørdur á teimum ferðandi, og í prísinum tey fáa, óansæð um tey keypa ferðaseðilin frammanundan umvegis talgildu bíleggingarskipanina ella á staðnum, áðrenn farið verður umborð á skipið. Almenn fráboðan um hetta kom frá Strandfaraskipum Landsins tann 17. september 2025.

Eftir stóð spurningurin um, hvussu fyrihaldast skal viðvíkjandi teimum borgarum, sum kunnu hava rindað ov høgan ferðaseðlakostnað uttan neyðuga heimild. Umboðsmaðurin spurdi tí ráðið um hesi viðurskifti tann 16. oktober 2025.

Ráðið greiddi umboðsmanninum frá, tann 30. oktober 2025, at ráðið er tilvitað um, at teir borgarar, sum í tíðarskeiðinum hava goldið hægri prís fyri ferðaseðil, enn heimilað var, eiga at fáa munin endurgoldnan.

Sambært skjølunum hevur ráðið tó ikki fyrrenn 23. oktober 2025 tikið samband við Strandfaraskip Landsins viðvíkjandi endurgjaldsspurninginum. Strandfaraskip Landsins er biðið um at kanna, hvussu endurgjaldsspurningurin kann viðgerast í praksis, somuleiðis sum Strandfaraskip Landsins eisini er biðið um at kanna, hvussu nógv ferðandi hetta fevnir um, hvussu stóra upphædd talan er um, og um tað er møguligt at eyðmerkja tey ferðandi, sum hava goldið ov nógv.

Eg undrist á, at spurningurin ikki varð umrøddur í fyrstu frágreiðing ráðsins til umboðsmannin, og at ráðið beinanvegin, tað var varugt við at heimild hevði manglað, ikki tók stig til eftirkanning. Spurningur var, sambært ráðnum, ikki settur Strandfaraskipum Landsins, fyrrenn eina viku eftir, at umboðsmaðurin hevði sett ráðnum uppfylgjandi spurning viðvíkjandi endurgjaldsspurninginum.

Hóast tað er ógreitt, í hvønn mun borgarar hava rindað ov høgan prís, haldi eg, at ein eftirkanning av hesum spurningi átti at ligið frammarlaga og stundisliga tikin upp hjá bæði Strandfaraskipum Landsins og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, tá tað gjørdist teimum greitt, at skipanin vantaði heimild.

Samanumtikið taki eg tó til eftirtektar at óheimilaði munurin, sum var gjørdur á borgarum við kravinum um luttøku í talgildu skipanini, nú er steðgaður, og at stig eru tikin til at kanna møguligan endurgjaldsspurning.

Eg haldi, at Strandfaraskip Landsins og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hava ikki tikið málið í nóg stórum álvara, og haldi tað vera átaluvert, at endurgjaldsspurningurin ikki varð tikin upp av ráðnum yvir fyri Strandfaraskipum Landsins fyrr enn eftir uppfylgjandi spurning frá umboðsmanninum.

**Samanumtikið**

Samanumtikið haldi eg málið vera álvarsamt. Tað er av stórum týdningi fyri tryggleika og rættin til líkaviðferð hjá borgarum, at slíkar umfatandi talgildar skipanir, sum hava stóra ávirkan á bólkar av borgarum, ikki vera settar í verk uttan umhugsni og vissu fyri heimild.

Eg fari tí at geva bæði Strandfaraskipum Landsins og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum eina álvarsliga átalu fyri framferðina í sambandi við, at nýggj ferðaseðlaskipan varð tikin í brúk í apríl 2025, og fyri handfaringina av málinum eftirfylgjandi. Eg fari samsvarandi § 10 í umboðsmanslógini at senda eina fráboðan um málið til Formansskap Løgtingsins, løgmann og landsstýrismannin í Fiskivinnu- og samferðslumálum.

At enda fari eg at biðja Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Um málið ikki er avgreitt innan tríggjar mánaðir, fari eg at biðja um at fáa kunning um støðuna í málinum.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður